# HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera okkum gullbrúdleypsdagin so hugnaligan og minnisríkan í kirkjuni og á veitsluni. Ein serstøk tøkk til børn okkara við familju, ið skipaðu so væl fyri degnum.
**Maria og Johan F. Magnussen**











veitst tú ikki tað?




**Góði Gubbi**
Tillukku við 40 ára føðingardegnum. Vónandi fær tú ein hugnaligan dag. Mamma og babba lata heilsa.
**Muss frá Sylviu Vár**



**Góða mamma og babba**
Hjartaliga tillukku við degnum, ið var 28. mars.
**Bestu heilsanir Miriam**



**Hey Ragnar**
Hjartaliga tillukku á 7 ára degnum 2. mai. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Heilsan Vár**



**Hey Tummas**
Takk fyri seinast.
**Heilsan hon sjálv**



**Góði Ragnar**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 2. mai. Alt tað besta.
**Ynskir Niels Jóhan**



**Til Birnu og Elisabeth**
Tykkum verður ynskt hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, gumma 9. apr. og mamma 4. mai.
**Heilsan myndatakarin**



**Góði mamba**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 27. apr. Takk fyri at tú ert so góður við meg.
**Heilsan Eyðun Fríði**
**PS:** Nú mást tú skunda tær



Hendan fitta gentan fyllir 11 ár 5. mai. Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegi tínum. Her er tú lítil, men í dag ein vaksin genta, góða Jónhild. Alt tað besta frá
**Ommu, abba og langommu**



**Góði Hans Arni**
Takk fyri ein góðan tur í Íslandi. Minnist tú hetta?
**Heilsan vit í Klaksvík**



**Eftirlýsing**
Sakaris Frederiksen 30 ár. Seinast sæddur við fallhjálmi í Porkeri. Hvar er hann?



**Góða stórasysti**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 4. mai. Muss og klemm.
**Høgni**



# TILTØK

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 18. mai hava Oda og Joen Elias Jakobsen úr Havn gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 17. mai í Meinigheitshúsinum í Havn. Tey, ið vilja koma og gleðast saman við okkum, kunnu ringja á tlf. 312703 áðrenn mánadagin 12. mai.

31. mai kunnu hjúnini Esther og Jógvan Nónsgjógv, við Gjógv halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin við Gjógv kl. 18.30. Tey, ið ynskja at gleðast saman við gullbrúðarparinum verða biðin um at siga frá áðrenn 18. mai á tlf. 423135 ella 264235.

## BRÚDLEYP

2. mai giftust í Bramming Manuela Rose frá Bramming og Oslakkur Thomassen, úr Sørvági. Brúdleypsadr.: Gyvelvej 17, 6740 Bramming.

Leygardagin 10. mai giftast í Keypmannahavn Una Zachariasen og John Lindberg. Brúdleypsadr.: Cedergangen 16, 2300 København S.

Leygardagin 17. mai giftast í Sandavágs kirkju Birita Petersen, Sandavágur og John Heri Mouritsen, Sørvágur. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í SÍF-húsinum.

Leygardagin 17. mai giftast Heidi Ingun Skillicorn og Búgvi Poulsen.
Adr.: 10.Birch Hill Grove,
Onchan IM3 - 4EJ,
Isle of Man
E-mail: abighi@manx.net

Leygardagin 17. mai kl. 10.00 giftast í Býráðshúsinum í Tórshavn Lisbeth á Marknagil, Klaksvík og Jóannes Næs, Hvalba. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 13.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarligast siga frá á tlf. 456240, 265474, 375185, 221020 áðrenn 3. mai.

Leygardagin 24. mai kl. 14.00 giftast í Nebo á Toftum Sóleyð Poulsen, Eiði og Heri Jacobsen, Toftir. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum, biðjast vinarliga um at siga frá á tlf. 423101, 222142 ella 222027 áðrenn 10. mai.

Leygardagin 7. juni kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Ingunn Innerdahl Hansen, Skopun og Petur Petersen, Havn. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 14. juni kl. 14.00 giftast í Rituvíkar kirkju Annfríð Eliasen, Leirvík og Jan Herman Hansen, Rituvík. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitsluna, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 443252 ella 447622 í seinasta lagi leygardagin 31. mai.

Tann 5. juli kl. 16.00 giftast í Guldager kirkju Súsanna Maria Gudmundsson, Norðragøta og Stefano Bove Formia Italia. Dagurin verður hildin í festsalinum á Tvillingernes kvt. 88, 6710 Esbjerg V. Tey, ið ynskja at gleða okkum á degnum verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 75 14 17 17 seinast 3. mai.

## KONFIRMATIÓN

4. mai konfirmerast Martin Larson Andersen úr Sandavági, sonur Maibritt Hansen og Lars Andersen, í Nørrelands kirke í Holsterbro. Adr. Dyssegården 47, 1. stv., 7500 Holsterbro.

Arngrím Witt Falkvard sonur Liljan Witt Falkenberg úr Miðvági, verður fermdur í Nørlem Kirke sunnudagin tann 4. mai Adr.: Nørrebjerg 37, DK-7620 Lemvig.

Sunnudagin 4. mai í Fuglebjerg kirke konfirmerast Jónas Johannesen, sonur Tórur og Birgitte Johannesen. Adr. Anne Marievej 1A, 4250 Fuglebjerg.

Sunnudagin 4. mai konfirmerast í Østerkornum kirke Kent Færch Christiansen, sonur Sandru Joensen, Leirvík og Gunnar Færch Christiansen, Guldbæk.

3. mai konfirmerast í Kolding Torleif Thomassen, sonur Svanhild Thomassen í Sørvági. Adr.: Seest Bakke 44, 6000 Kolding.

### Gudstænastur Sunnudagin 4. mai

*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Vestmanna:* kl. 11, Marjun Bæk
*Kvívík:* kl. 12, Inga Poulsen Dam. (Í Haldórsvíkar kirkju verður nú farið í kirkju kl. 11)
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
*Sandavágur:* kl. 11, David Johannesen
*Norðskála:* kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson. Kirkjukaffi aftaná
*Eiði:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen. (Broytt kirkjutíð. Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju á Eiði og við Norðskála kl. 11)
*Glyvrar:* kl. 11, konfirmatión, Meinhard Bjartalíð
*Viðareiði:* kl. 11 lestur. (Frá og við sunnudegnum 4. mai verður farið í kirkju á Viðareiði kl. 11).
*Sumba:* gudstænasta v/altarg., Ólavur Ramussen

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Morgunmøti, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mikudagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Skeið um barnaarbeiði verður í Hebron á Argjum 3. mai. **Tilmelding á tlf. 315280**.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Samkoman Rhema
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti.
Mánakvøldið 5. mai kl. 20 Felagsbønarmøti í Filadelfia vegna Hvítusunnustevnuna. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

### Karisma
Hvítusunnustevnan 2003 verður í døgunum 6.-9. juni í Ítróttarhøllini á Hálsi, har tiltøk verða fyri allar aldursbólkar. Nærri verður lýst seinni.

### Samkoman Lívdin
Í Hoyvíkar skúla:
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómstiltak har Karl Johannesen talar um evnið: Pornografi.
Sunnumorgunin Familjumøti kl. 10.30 og Tilbiðjunarmøti kl. 12. Á báðum møtunum talar Poul Guttesen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. www.livdin.fo

### Meinigheitshúsið
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta kvinnur, kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli har sunnudagsskúlabørn spæla leik og syngja., kl. 18 Møti við Petur Skeel Nolsøe.

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hósdag kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

### Meinigheitin í Hoyvík
*uppi á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Símun Absalonsen, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Møti har Jógvan Zachariassen talar um evnið: Jesus og samkoman. Heimasíða www.hebron.fo

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Rikard Jacobsen bónda í Kongsstovu í Nólsoy.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti í Filadelfia vegna Hvítusunnustevnuna.
Telefonandaktin 424741.

### Møti í Bø
Møti verður í skúlanum í Bø sunnukvøldið kl. 18 við luttøku úr Havn.

### Hósvík
Møti verður í Hósvíkar kirkju 4. mai kl. 18. Luttøka verður av Meinigheitskórinum í Havn. 1/2 tíma áðrenn møti byrjar, verður bønarløta. Innsavning verður fyri heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Nerija á Skála
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti, kl. 22 Opið hús.
Leygardagin kl. 15 Seminar, kl. 20 Møti, kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti.

### Lívsins Orð
Sunnudagin kl. 17 verður møti við Palla Højgaard.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

### Keldan
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús. Team úr Mariager luttekur.
Sunnukvøldið kl. 17 Møti við Jóhan Petur Jóhannesen.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

### Tofta missiónshús
Ungdómsmøti v. bíbliutími verður í kvøld kl. 20. Evni: Halgan. Øll eru vælkomin.

### Thabor, Fuglafjørður
Leygardagin kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Familjumøti. Tað verður ein náttúrðabiti at fáa og eisini verður ársgávan til Heimamissiónina savnað inn.

### Missiónshúsið í Leirvík
Trev Gregory talar sunnukvøldið kl. 18 til møti og kl. 21 til Ungdómsmøti. Báðar talurnar verða tolkaðar til føroyskt.

### Gøta
**Ungdómsmøti** verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20, Oggi luttekur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gøta
Tirsdag kl. 20 Glyvra-Hanusars hús, bibeltime: 1. Korintherbrev 16 v. Peter O. K. Olofson.

### Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Innsavnan. Øll eru vælkomin.

### Betania, Skopun
Leygardagin kl. 11 Barnaarbeiði (3) 4 til 6 ár, kl. 14 Barnaarbeiði, 1., 2. og 3. fl., kl. 16 Barnaarbeiði 4., 5. og 6. fl.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Verið hjartaliga vælkomin.

### Betania, Sumba
Á møtinum sunnukvøldið kl. 20 talar Osvald Kjærbo. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Getsemane
*Á Brekku 19, Klaksvík*
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 Hugnakvøld, Heini Lützen syngur og vitnar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Poul Nikolai Steinberg.

### Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin. Børnini fara í kirkju.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Vági
Leygardagin kl. 16.30 Andakt á Sambýlinum.
Sunnudagin kl. 18 Møti við Kirstein Stórhamar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Men Pilatus skrivaði eisini eina yvirskrift og setti hana á krossin, har stóð skrivað: Jesus av Nasaret, kongur jødanna.*
*Jóh. evengl. kap. 19 v. 19*

Soleiðis ljóðaði yvirskriftin sum Pilatus setti á krossin yvir Jesus.

Eingin skuldi vera í iva, hvør hann var. Tí var yvirskriftin skriva á hebraiskum, latín og grikskum.

Jødarnir royndu at fáa yvirskriftina orðaða annarleiðis, men hettar eydnaðist ikki. Uttan at vita tað, hevði Pilatus skrivað sannleikan.

Jesus er kongur yvir hvørjum einasta menniskja, ikki bert yvir teimum sum velja at fylgja honum. Men í ævinleikanum skal tað koma at ljóða til mong, tit forkastaðu tykkara lívs kong. Og tað er tann størsta syndin eitt menniskja kann gera at vraka kong konganna Jesus. At vraka Jesus er at vraka Gud, og tað verður ikki gjørt óstraffað. Hesi skulu koma at fáa ein ævinleika uttan hann og undir hansara vreiði og dóm.

Jesus er kongur, gev honum kongapláss, hann vil vera tín og tá hann fær pláss í tínum lívi, so er tað tín lukka og eydna at verða hansara og í hansara tænastu.

Í orðinum møtir tú Jesusi, honum sum vit ein dag í ævinleikanum skulu standa andlit til andlit við.

At hyggja uppá Jesus er einasti vegur til æviga gleði, og tað er eisini ein tryggur vegur at ganga.

Latum okkum tí takka og prísa Jesusi fyri alt tað hann hevur gjørt fyri at vit kunnu verða frelst og koma heim í teir ævigu bústaðirnar sum hann er farin at gera til reiðar.

Skulu vit koma heim ein dag, so megu vit krína hann til kong í okkara lívi og siga, Hann skal ráða, Hann skal vera Harri. Honum vil eg fylgja.

**Regin Høgnesen**